LM-115/2020

FYLGISKJAL 8

KRINGVARP FØROYA

Tórshavn 25.01.21

Hoyringarsvar til uppskot um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul.

Ætlanin er at broyta miðlastuðulslógina við tí endamáli *"...at tryggja, at miðlastuðulin verður býttur út eftir nýggjum leisti, sum skal vera við til at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum."* Hetta skal í høvuðsheitum gerast soleiðis, at talan skal vera um verkætlanarstuðul heldur enn stuðul, sum skal veitast eftir lønarútreiðslum.

Tað eru uttan ivi lýti í verandi lóg men tað er ivasamt, um broytingin til verkætlanarstuðul fer at bøta um dygdina.

Grein 3 í galdandi lóggávu leggur upp til, at hædd verður tikin fyri, at stuðul verður latin til miðlar, so teir gerast betur førir fyri at framleiða dygdargott tilfar. Har stendur millum annað at *"miðilin skal hava eitt redaksjonelt innihald innan eitt breitt evnisøki, og talan skal í høvuðsheitum vera um viðgerð av aktuellum tíðindatilfari av politiskum, samfelagsligum og mentanarligum slagi, sum er lagað til fólkið í Føroyum, og sum lýsir føroysk samfelagsviðurskifti ella útlendsk viðurskifti úr einum føroyskum sjónarhorni".*

Eitt annað krav er eisini, at miðil skal hava ábyrgdarhavandi blaðstjóra og minst tvey redaktionell starvsfólk.

Vansin við stuðulsveitingini seinastu árini tykist vera, at stórur dentur hevur verið lagdur á samlaða starvsfólkatalið, og síðan hevur verið býtt út eftir tí. Sostatt tykist omanfyri nevnda áseting í grein 3 ikki at verða brúkt til fulnar. Tað er óheppið, tí tá er eingin meting gjørd um miðilin, sum stuðulin er latin. Var omanfyri nevnda áseting tikin í tí álvara hon eigur, so hevði menningin av miðlunum helst verið størri enn talan hevur verið um.

Hetta kundi verið broytt soleiðis, at stuðulin bleiv latin eftir redaktionellum starvsfólki og hvussu nógv ársverk keypt tilfar frá fríyrkisfólkum svarar til.

Ein annar trupulleiki er, at so nógvir miðlar skulu býta lutfalsliga so fáar pengar. Her kundi ein ávísur munur verið gjørdur millum miðlar, soleiðis at teir, sum framleiða týðandi nøgdir av egnum tilfari, lutfalsliga fáa meira. Soleiðis fæst meira dygdargóð føroysk framleiðsla fyri pengarnar.

Verkætlanarstuðul fer neyvan at styrkja føroysku miðlarnar, tí teir bløða í dagliga rakstrinum sum krevst av einum miðli. Verkætlanarstuðul kann skjótt enda við ov nógvari umsiting, og at hann verður latin antin til íverksetaraætlanir ella prosjektir, sum miðlarnir møguliga als ikki eru áhugaðir í, tí tað ikki hóskar inn í teirra konsept. Tá kann vera óheppið at ein nevnd ger av, hvat slag av journalistikki hon heldur vera tann rætta. Góðska er eisini er vítt hugtak, tí tey krøvini kunnu vera ymisk frá miðli til miðil.

Íverksetan hoyrir eisini heima í øðrum lógarverki. Verandi miðlar fara tí neyvan at fáa tað stóra burtur úr ætlaðu broytingunum.

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur Postboks 1299 FO-110 Tórshavn Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01 kringvarp@kringvarp.fo

KRINGVARP FØROYA

Nevnt verður, at vanligt er at veita stuðul á henda hátt á mentanarøkinum. Her má havast í huga, at her er ikki talan um tað, vit vanliga hugsa um mentan, men miðlar í dagligari framleiðslu, ið eru tyngdir av fallandi inntøkum og dýrari distributión.

Tað er at fegnast um, at landsstýrismaðurin vil fremja átøk á økinum, tí vit ynskja øll eitt fjølbroytt miðlalandslag. Verandi uppskot til broytingar fer tó neyvan at styrkja privatu miðlarnar stórvegis. Møguliga fara einstakar greinarøðir at vera fíggjaðar við hesum pengum, men tær greinarøðirnar finnast longu í dag, og verða ofta keyptar í sunnari kapping. Munurin frameftir kann blíva, at kappingin um dygdargóðan journalistikk minkar, og at tær upp á seg gerast dýrari við almennum stuðli, sum sostatt ikki gagnar nøkrum. Tað tekur eisini sjálvræðið frá miðlunum, sum mugu lata tað upp í hendurnar á eini almennari nevnd at gera av, hvat miðilin skal leggja dent á.

Samanumtikið verða góðu ætlanirnar hjá landsstýrismanninum - um at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum - tí best framdar við at gagnnýta galdandi lóggávu til fulnar.

Vinaliga,

Ivan Hentze Niclasen,

stjóri - KvF

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur Postboks 1299 FO-110 Tórshavn Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01 kringvarp@kringvarp.fo